

*Egil á Bø og EB/Streymur høvdu gott tak á Jákupi á Borg og B36*

*Mynd: Sofus Johannesen*

## Vit vístu sera góðan stríðsvilja allan dystin, har allir mans arbeiddu hart fyri hvørjum øðrum

kann eingin siga nakað um stríðsviljan hjá sundalagsmonnum. Teir vildu meira enn gestirnir, sum manglaðu hugflog og neyðuga stríðsviljan at svara aftur. Tískil vann EB/Streymur ein uppibornan arbeiðssigur á einum tomum B36 liði.

### Sorin setti hol á

Eftir ein mállеysan fyrra hálvleik, har EB/Streymur hevði havt flestu málroyndirnar, so kom rættuliga gongd á eftir steðgin.

EB/Streymur legði seg á odda tá gott korter var farið av seinra hálvleiki. Málskjútti var Sorin Anghel, sum ótarnaður kundi stúta bóltin í kassan, eftir innlegg úr høgru síðu.

Tað var sum at fáa váta vøttin hjá B36, tí beint áðrenn sundalagsmenn løgdu seg á odda, fekk Christian R. Mouritsen ein góðan kjans, men René Tórgarð bjargaði. Ein misnýttur kjansur, sum gjørdist sera dýrur hjá B36.

Eftir at sundalagsmenn høvdu lagt seg á odda var vent í holuni. Nú vóru tað B36 sum skuldi fram á vøllin, meðan EB/Streymur vóru klárir til steypafinaluna um støðan helt sær.

Hóast sundalagsmenn høvdu neyðuga úrtlitið í skjáttuni, so løgdu teir seg ikki aftur at verja, men hildu á at trýsta høgt á vøllinum. Taktikkurin hjá vertunum riggaði til fullnar, tí B36 kláraði ikki at fáa takið á dystinum. Heldur vóru tað sundalagsmenn sum høvdu bestu kjansirnar, meðan tað var alt ov lítið bit í álopinum hjá B36.

Tískil var tað í trá við spæl og kjansir at EB/Streymur økti um leiðsluna stutt undan dystarloki, við brotsparki, sum Kristoffur Jakobsen setti trygt í málið. Fleiri mál komu ikki í dystinum, sum endaði 2-0 til EB/Streym

Sostatt vann EB/Streymur samanlagt 3-2 á B36, og eru klárir til finaluna í steypakappingini 6. august, í Klaksík, meðan B36 hevur nógv at rættað uppá innan næsta landskappingardyst.

*post@sosialurin.fo*

**EB/Streymur - B36** 2-0 (0-0)
**1-0: Sorin Anghel, 62.**
**2-0: Kristoffur Jakobsen, 86. br**
Dómari: Petur Reinert

**EB/Streymur:**
René Tórgarð – Kristoffur Jacobsen, Marni Djurhuus, Egil á Bø, Dánjal Davidsen – Gudmund Nielsen (Bjarni Jørgensen, 62.), Gert Hansen, Pætur Dam Jacobsen, Daniel Udsen (Leif Niclasen, 79.) – Sorin Anghel (Arnar Dam, 69.), Arnbjørn Hansen

***Gult kort:*** Sorin Anghel, Gert Hansen

**B36:**
Jóan Pauli Dahl Jakobsen – Johan Ellingsgaard (Hjalgrím Elttør, 46), Fróði Clementsen (Dimitrij Jankovic, 78.), Oddmar Færø, Herbert í Lon Jacobsen – Bárður Olsen, Klæmint Matras, Róaldur Jacobsen, Heini í Skorini (Høgni Eysturoy, 23.) - Christian R. Mouritsen, Jákup á Borg

***Gult kort:*** Heini í Skorini, Róaldur Jacobsen

## Egil á Bø:

# Viljin var munurin

– Eg eri sera errin av okkara avriki í dystinum, segði ein fegin liðskipari hjá EB/Streymi, Egil á Bø eftir dystin, tá Sosialurin fekk orðið á hann.

Eftir at hava tapt fyrra hálvfinaludystin 2-1, skuldu sundalagsmenn vinna við Margáir í gjár, um teir skuldu koma í steypafinaluna fjórða árið á rað. Egil á Bø metir at hetta sást aftur á vøllinum, har sundalagsmenn vildu meira, og stríddust sum úlvar á skóg fyri hvørjum bólti, og av tí sama fekk B36 ikki glið á sítt spæl.

– Sjálvt tá vit koma á odda miðskeiðis í seinra hálvleiki, so trekkja vit okkum ikki aftur á vøllin fyri at verja, men blíva við at spæla á sama hátt, og tað gav úrslit.

– Tískil er tað fult uppiborið at vit vinna dystin, og koma í finaluna í steypakappingini, sigur Egil at enda.



*Mynd: Sofus Johannesen*

## Klæmint Matras:

# Vit fingu ikki glið á egið spæl

Tað var ein sera skuffaður, men avgjørdur Klæmint Matras, sum Sosialurin fekk orðið á eftir dystin

– Vit høvdu sera trupult við at fáa spælið hjá okkum at koyra, men sjálvt um tað gekk betri eftir steðgin, so var EB/Streymur betra liðið, og var tað tí uppiborið at teir vunnu, segði liðskiparin hjá B36.

B36 hevur havt trupult við at umseta kjansir til mál í hesum kappingarárinum, og tað kom aftur til sjóndar við Margáir í gjárkvøldið. Klæint Matras vísir á, at av tí at teir ikki kláraðu at mynda dystin, so er trupult at koma fram til kjansir.

– Sjálvandi eru vit skuffaðir at tapa í hálvfinaluni, men nú mugu vit bara leggja tapið aftur um bak, og hugsa um landskappingina, segði Klæmint Matras.